UTTAN ÚR HEIMI

# Hann var "Deep Throat"

**Ein av teimum størstu gátunum í altjóða tíðindaheim- inum er nú loyst**

WATERGATE
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 17. juni í 1972 tók amerikanska løgreglan fimm menn, sum royndu at bróta inn í høvuðsstøðina hjá demokratiska flokkinum í Watergate í Washington. Kanningarnar hjá løgregluni avdúkaðu, at Hvítu Húsini høvdu verið uppi í innbrotsroyndini, og endin varð, at Richard Nixon mátti leggja frá sær sum forseti.

Men hvør var tað, sum leiddi løgregluna á sporini úr Hvítu Húsunum? Blaðmenninir Bob Woodward og Carl Bernstein, sum feldu Nixon, hava øll árini síðani sýtt fyri at avdúka, hvør kelda teirra, sum gekk undir navninum "Deep Throat", var, og gitingarnar hava verið nógvar.

Men nú er gátan loyst. Tann 91 ára gamli Mark Felt, sum var varastjóri í FBI, váttaði fyrrakvøldið, at tað var hann, sum gav teimum báðum blaðmonnunum upplýsingarnar, og seinni váttaði blað teirra, Washington Post, at tað er so.

Harvið er ein av teimum størstu gátunum í altjóða tíðindaheiminum loyst.



*Tann 91 ára gamli Mark Felt váttar nú, at han var "Deep Throat"*

# Sviar vilja hava fólkaatkvøðu

**Gøran Persson, forsætisráðharri, er undir stórum trýsti, tí hann sýtir fyri at lata sviar taka støðu til ES-grundlógina. Tað kann fáa avleiðingar fyri stjórnina**

SVØRÍKI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

- Frakland eigur at fáa somu møguleikar, sum Danmark og Írland fingu, tá tey vrakaðu Maastrichtsáttmálan og Nice-sáttmálan, og tí skulu fransmenn fá stundir til at hugsa seg um, til hini londini hava staðfest ES-grundlógina, sigur svenski forsætisráðharrin.

Gøran Persson heldur fast um, at svensku veljararnir sleppa ikki at siga sína hugsan um grundlógina. Tað skal Ríkisdagurin gera í desember, og franska úrslitið fær onga ávirkan á hesa avgerðina, sigur Persson.

Men kravið um fólkaatkvøðu herðist í hvørjum. Í sosialdemokratiska flokkinum hjá forsætisráðharranum eru fleiri, sum krevja fólkaatkvøðu, og tað ger Vinstriflokkurin eisini. Flokkurin tryggjar stjórnini parlamentariskan meiriluta, og formaðurin, Lars Ohly, hóttir nú við at taka stuðulin undan stjórnini.

- Eg vóni, at stjórnin skilir álvaran í hesum, sjálvt um einki tykist benda á, at so er. Eg eri sannførdur um, at støðan verður ein onnur aftan á ríkis- og stjórnarleiðarafundin um fjúrtan dagar. Hendir einki tá, fær Gøran Persson eina álvarssama innanríkispolitiska keppu, sum hann sjálvur hevur elvt til, sigur Lars Ohly við tíðindastovuna TT.

Fyri tveimum árum síðani tapri stjórnin eina fólkaatkvøðu um at seta evruna í gildi ístaðin fyri krónuna, og eygleiðarar siga, at tað er orsøkin til, at Gøran Persson ikki vil hava fólkaatkvøðu um ES-grundlógina, tí hann er bangin fyri at tapa eina ferð afturat.

Sosialdemokratar, sum eru ímóti grundógini, eru í ferð við at fáa flokslimir at skriva undir eitt krav um fólkaatkvøðu. Eydnast tað at fáa fimm prosent av limunum at skriva undir, hevur forsætisráðharrin einki í alt velja, tí tað siga reglurnar hjá flokkinum. Samstundis hava meiningakanningar víst, at 65 prosent av veljarunum vilja hava fólkaatkvøðu um ES-grundlógina.

## Læna ov nógv

Norges Bank ávarar nú um, at norðmenn læna ov nógvar pengar, og at fólk hava ikki tryggjað seg nóg væl ímóti, at rentan kann fara upp í komandi árum.

Seinastu árini hava norðmenn lænt nógvar pengar til privata nýtslu, og Norges Bank roknar við, at lántøkan fer at halda fram tey næstu árini. Tøl hjá bankanum vísa, at í løtuni í dag er gjaldsbyrðan hjá hvørjum húsarhaldi 1,7 ferð størri enn tann tøka inntøkan. Fyri fimm árum síðani var gjaldsbyrðan 1,2 ferð størri enn tann tøka inntøkan, og bankin roknar við, at um tvey ella trý ár verður hon tvær ferðir størri.

Men rentan er ein vandi, sigur Norges Bank. Bankin vísir á, at í dag brúka fólk fýra prosent av lønini til at gjalda rentur við, men í 2008 skulu tey brúka næstan sjey prosent til rentur, og hesum hava bara tey fægstu tryggja seg ímóti, sigur bankin.

## Stríðast um stuðul

Seinastu tíðina hava USA og ES stríðst um tann almenna stuðulin til flogverksmiðjurnar Boeing og Airbus, men nú hava amerikanararnir mist tolið, og teir hava gjørt av at leggja málið fyri altjóða handilsfelagsskapin WTO. Tað gjørdu teir mánakvøldið.

Amerikanski umboðsmaðurin í WTO, Rob Portman, sigur, at ein samráðingarloysn hevði verið tað besta, men at partarnir koma ikki á mál, nú ES aftur hevur latið Airbus-verksmiðjuni stuðul. Handilskommiserurin hjá ES, Peter Mandelstam, sigur seg vera vónsviknan av amerikonsku avgerðini at biðja WTO taka støðu til málið. Hann vísir á, at ES hevur júst lagt eitt semingsuppskot fyri amerikonsku stjórnina, men at Washington hevur ikki svarað tí.

USA legði málið um stuðulin til Airbus-verksmiðjuna fyri WTO í oktober í fjør, og stutt eftir ákærdi ES USA fyri at lata Boeing-verksmiðjuni stuðul. Tær báðar verksmiðjurnar eru í sera harðari kapping um at smíða ferðamannaflogfør.

## Eingin nazilóg í Ísrael

Í sambandi við eina húsarannsókn í Jerusalem hevur ísraelska løgreglan avdúkað ein nýnazistiskan felagsskap.

Løgreglan hevði fingið frænir av, at ein maður hevði smuglað rúsevni, og tá løgreglan fór at kanna hús hansara, kom hon fram á eina teldu við nógvum nýnazistiskum tilfari. Harafturat vísti tað seg, at maðurin hevði eitt av teimum kendu naziteknunum á øðrum arminum.

Løgreglan í Jerusalem sigur við AP, at umleið 20 fólk eru limir í felagsskapinum, og at talan er um fólk úr gamla Sovjetsamveldinum, sum hava búsett seg í Ísrael. Ein talsmaður hjá løgregluni sigur, at málið er trupult, tí Ísrael hevur onga lóg, sum bannar nazistiskum stuðulsfelagsskapum.

- Fleiri lond í Evropa hava tílíka lóg, men hvør skuldi trúð, at vit skuldu fáa trupulleikar av hesum slagnum her í Ísrel, sigur talsmaðurin.

## Kann fáa risabót

ES hóttir við at geva geva Microsoft stóra bót, um fyritøkan ikki letur aðrar framleiðaar sleppa fram at marknaðinum.

Herfyri avgjørdi ein ES-nevndin, at Microsoft skal gera eitt Windows-forrit uttan Windows Media Player, soleiðis at aðrir framleiðarar kunnu fáa tann partin av skipanini, sum er at finna í umleið 90 prosentum av øllum teldum í heiminum. Microsoft kærdi avgerðina til dómsvaldið, men tapti, og rætturin álegði fyritøkuni at laga seg eftir úrskurðinum í seinasta lagi tann 31. mai.

Microsoft hevur gjørt eina Windows-skipan uttan Media Player, men sambært ES er hon ikki nóg góð. Tí hóttir ES nú við at krevja dagbøtur frá fyritøkuni. Og hetta eru ikki smáar bøtur, tí sambært reglunum kann ES krevja fimm milliónir dollarar um dagin, men sambært Reuters ætlar ES at royna okkurt annað revsitiltak fyrst.